# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Við at tveita skógvarnar eftir Bush gjørdi tíðindamaðurin tað, sum teir arabisku leiðararnir ikki tordu at gera*

*jordani við BBC*

# Bagger viðgingið seg sekan



*Sambært danska ákæruvaldinum hevur Stein Bagger svikað fyri áleið eina milliard krónur*

**Stein Bagger, sum er skuldsettur fyri at hava svikað fyri umleið eina milliard krónur, kom í morgun úr USA til Danmarkar. Hann hevur longu viðgingið seg sekan í tveimum ákærum**

Eftir at hava sitið átta dagar í fongsli í Los Angeles kom danski vinnulívsmaðurin Stein Bagger við flogfari til Kastrup í morgun. Haðani fór hann til grundlógaravhoyring í Lyngby, og síðani skuldi hann til avhoyringar hjá bakmansløgregluni.

Fyrrverandi stjórin í IT Factory hvarv í Dubai tann 27. november. Tað vísti seg, at hann var farin til USA, har hann gav seg yvir til løgregluna, eftir at donsku myndugleikarnir høvdu sóknast eftir honum ígjøgnum Interpol.

Danska ákæruvaldið vil vera við, at Stein Bagger hevur svikað fyri umleið eina milliard krónur.

Hann hevur longu viðgingið seg sekan í sviki og grovum undandrátti.

## STUTT SAGT

### Rættiligt snartok

Italiumenn hava nú gjørt eitt tok, sum av røttum kann kallast snartok. Tað nýggja tokið skal millum annað koyra ímillum býirnar Milano og Bologna. Teinurin er 210 kilometrar, og hann klárar tokið upp á 65 minuttir, skrivar AFP. Vanlig tok brúka um leið tvær ferðir so langa tíð um teinin. Næsta ár er ætlanin, at snartok av hesum slagnum skulu koyra ímillum Milano og Rom, og ferðin fer væntandi at taka hálvan fjórða tíma.

Felagið, sum hevur latið tað nýggja tokið byggja, sigur, at ætlanin er at kappast við flogfeløgini um ferðafólkini. Eitt nú væntar felagið at fáa umleið 60 prosent av ferðafólkunum, sum ferðast millum Milano og Rom.

Men „Reyði ørvur", sum tað nýggja tokið eitur, setir stór krøv til jarnbreytina, og í fleiri førum noyðast myndugleikarnir at leggja nýggjar breytir til tað nýggja tokið.



*Nýggja snartokið hevur fingið navnið „Reyði ørvur"*
*Mynd: AFP*

### Noktar seg sekan í drápi

Tann kendi leikritahøvundurin og filmsstjórin Roger Avary er ákærdur fyri óviljað manndráp og skal møta í rættinum í februar.

Hann er ákærdur í samband við eina ferðsluvanlukku í januar. Roger Avery koyrdi við kenning og fór útav við tí úrsliti, at ein maður, sum var í bili hansara, doyði. Roger sjálvur fekk ikki skaða, men kona hansara fekk stóran skaða, men slapp við lívinum.

Roger Avery noktar seg sekan í óviljaðum manndrápi, men verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í 11 ára fongsul.

Saman við Quentin Tarantino skrivaði Roger Avery leikritið til filmin „Pulp Fiction", sum teir fingu Oscar-virðisløn fyri.

OPEC:

## - Oljan er ov bílig

**Í morgin fara OPEC-londini at taka støðu til, um tey skulu skerja framleiðsluna, og alt bendir á, at tað verður úrslitið**



*Chakib Khelil er formaður í OPEC-felagsskapinum*
*Mynd: Polfoto*

- Øll londini taka undir við at skerja framleiðsluna, og eg ivist ikki í, at tað verður úrslitið, tá vit hittast, sigur OPEC-formaðurin, Chakib Khelil, við Reuters undan tí avgerandi fundinum í morgin.

Formaðurin ásannar, at eftirspurningurin eftir olju er minkandi orsakað av teirri búskaparligu afturgongdini kring heimin, og hann væntar ikki, at eftirspurningurin fer at veksa aftur í bræði, sigur hann.

Sjálvur heldur Chakib Khelil, at OPEC-londini eiga at vera nøgd, um oljuprísurin kann halda sær á umleið 75 dollarum fyri tunnuna.

Nrskimarknaðarserfrøðingurin Sandrine Tørstad væntar, at OPEC fer at skarva millum hálva aðru og tvær milliónir tunnur av teirri dagligu framleiðsluni, og at prísurin fer at halda sær millum 45 og 50 dollarar.

40 prosent av allari olju í heiminum kemur úr teimum 13 OPEC-londunum. Oljulond sum Russland, Noreg og Meksiko eru ikki limir í OPEC.

# Bush órógvar ætlaninar hjá eftirmanninum



*George W. Bush órógvar politisku ætlaninar hjá Barrack Obama*
*Mynd: AP*

**Áðrenn hann fer frá, ætlar George W. Bush at staðfesta fleiri kunngerðir, sum ganga ímóti ætlanunum hjá Barrack Obama**

Amerikanska lógin heimilar tí fráfarandi forsetanum at seta í gildi ymsar reglur, og hóast tær hava sama gildi sum lógir, nýtist honum ikki at leggja tær fyri Kongressina. Sambært bretska blaðnum The Observer ætlar Bush at brúka hesa heimildina til at seta í gildi ymsar reglur, hóast tær ganga ímóti tí, sum eftirmaður hansara ætlar.

Millum annað ætlar Bush at staðfesta nakrar kunngerðir á umhvørvisøkinum, sum ganga beint ímóti hugsjónunum hjá Barrack Obama. Eitt nú geva nýggju reglurnar orkuverkunum munandi rúmari ræsur at dálka enn tað, sum Obama ætlar at krevja av teimum. Í øðrum førum snýr tað seg um rættin til at brúka vápn og rættindini hjá kvinnum til fosturtøku.

Tað er vanligt, at fráfarandi forsetin í USA brúkar heimildina at seta í gildi kunngerðir uttan um Kongressina, men sambært The Observer brúkar Bush heimildina munandi meiri enn undanmenninir Bill Clinton og Bush eldri. Sambært blaðnum er í fleiri førum talan um, at forsetin gevur sínum stuðlum í amerikanska vinnulívinum eina samsýning, áðrenn hann fer frá.